# Aston Martin við nýggjum Lagonda



Aston Martin í Onglandi fara aftur at gera ein luksusbil við navninum Lagonda, upplýsti forstjórin í Aston Martin, Dr. Ulrich Bez herfyri í London.

Aston Martin Lagonda, sum varð gjørdur frá 1976 til 1991, var ein bilur við sermerktum designi, men hesin nýggi Lagonda fer at líkjast meira teimum Aston Martin modellunum, sum eru á marknaðinum í dag.

Nýggi Lagonda skal eftir ætlan koma á marknaðin í 2012. Aston Martin eru annars best kendir frá James Bond filmum.

**mg**




*Nýggi Lagonda kemur eftir ætlan koma á marknaðin í 2012*







*Aston Martin Lagonda, sum varð gjørdur frá 1976 til 1991, var ein rættuliga sermerkur bilur*